ETISKA RÁÐIÐ

## Hoyringarsvar til Uppskot til Løgtingslóg um farsóttir (farsóttarlógin)

Etiska ráðið fegnast um, at politiska skipanin tekur stig til at fyrireika seg til enn ókendar, framtíðar heilsukreppur við m.a. tilbúgvingarætlanum og dagføring av farsóttarlógini, og takkar fyri høvið at gera viðmerkingar til uppskot til nýggja farsóttarlóg.

Umfatandi heilsukreppur innibera ofta álvarsamar tvístøður fyri demokratiskar stjórnir: tørvurin á bráðfeingis átøkum til tess at verja lív og heilsu borgaranna, kann viðhvørt rættvísgera ávísar avmarkingar av grundleggjandi rættindum so sum savningarfrælsi og frælsi at ferðast frítt. Í somu løtu slík rættindi verða avmarkað, má tó eisini vera greitt, at samfelagið nú er á einari vandamiklari kós, og at neyðugt er at traðka sera varisliga fyri at varðveita etiskt haldføri og demokratiskan legitimitet.

Umframt vandan fyri at inntrivið í frælsi og rættindum gerst ov víðgongd, ógjøgnumskygd ella ikki longur stendur í mát við heilsuvandan, er m.a. neyðugt at vera tilvitað um vandan fyri, at skerjanin av rættindum normaliserast. Serstakar heimildir, bert ætlaðar neyðstøðum við tí fyri eyga at verja almennu vælferðina, kunnu í ringasta føri – um tær ikki eru væl avmarkaðar og forsvarliga umsitnar – gerast varandi partur av samfelagsskipanini, og virka sum amboð fyri øktum statsvaldi. Óttin fyri valdsmisnýtslu eigur ikki at vera stýrandi, ella forðandi fyri neyðugar heimildir í einari álvarsamari heilsukreppu, men tað hevur stóran týdning at geva sær far um, at kreppustøður ofta skapa góð kor fyri, at tær vanligu demokratisku verjumekanismurnar vera skúgvaðar til viks, og at ein slík støða minkar samfelagsins mótstøðuføri mótvegis valdsmisnýtslu.

Uppskotið til nýggja farsóttarlóg heimilar munandi inntriv í frælsi og rættindi hjá borgarunum undir serligum umstøðum. Millum annað eru ásetingar, sum heimila frælsistøku (tvingsil í samband við t.d. avbyrging og viðgerð), skerjing í rættinum frítt av savnast til friðarlig endamál (forboð fyri, at fleiri persónar eru savnaðir á einum stað), og skerjing av samvitskufrælsinum (skyldu til at fráboða lækna ella heilsustarvsfólki, um kunnleiki er til at onkur annar hevur eina ávísa smittusjúku). Endamálið við hesum heimildum, sum bert gera seg galdandi í serligum neyðstøðum, er at verja samfelagið móti vandamiklum farsóttum, og etiska grundgevingin er sostatt at minka um líðing og økja um tryggleika.

Etiskt sæð er í slíkum støðum eitt grundleggjandi stríð millum felags gagnsemi og virðing fyri einstaklingum – millum nyttuetiskar og pliktetiskar meginreglur. Uppgávan er at tryggja munadygg heilsuverndarátøk, samstundis sum at skerjingin av rættindum verður so avmarkað í tíð og vavi sum gjørligt, stendur í mát við heilsuvandan, javnan verður endurskoðað, og at borgarar altíð varðveita eitt nú kærurættindi og mótmælisfrælsi.

Etiska ráðið metir sum heild, at uppskotið til farsóttalógina er hóskandi tilvitað um etisku og demokratisku vandarnar við sínum heimildum. Dentur er m.a. lagdur á sjálvbodna viðvirkan framum tvingsil, og á lutfalsmeginregluna, sum inniber at bara tey minst inntrivandi átøkini, sum samstundis røkka endamálinum, kunnu setast í verk. Avmarkingar og forboð kunnu vanliga bert vera galdandi í 4 vikur í senn, og tiltøk við politiskum endamáli eru undantikin tær samfelagsligu smittuverjufyriskipanir

umtalaðar í kapittul 3. Á hendan hátt verður tryggjað, at borgarir framhaldandi hava rætt eitt nú at mótmæla politisku avgerðirnar.

Etiska ráðið metir tó, at uppskotið kundi verið styrkt við enn fleiri verjumekanismum, og hevur í tí sambandi tríggjar viðmerkingar:

*§ 4, stk. 3: "Ein og hvør, ið hevur kunnleika til, at ein persónur hevur eina alment vandamikla ella samfelagshóttandi sjúku, skal skjótast gjørligt venda sær til lækna ella heilsustarvsfólk, um sjúkutilburðurin ikki longu er fráboðaður."*

Endamálið við ásetingini er at forða fyri at ein smitta breiðir seg ótarnað, um ein persónur við ávísari smittusjúku ikki sjálvur hevur boðað myndugleikunum frá. Sum skilst av § 52, er eingin revsing fyri ikki at halda hesa fráboðanarskyldu. Tó ásetir § 54 eina revsing við bót ella fongsli fyri brot á ásetingar í kunngerðum við heimild í farsóttarlógini. Um ein líknandi fráboðanarskylda kann ásetast í kunngerð, og sostatt um har kunnu koma støður har brot á fráboðanarskylduni kann revsast, er Etiska ráðnum ógreitt.

Heilsufakligt kann ein áseting um fráboðanarskyldu vera skilagóð, men minst tríggjar orsøkir eru allíkavæl til at fara fram við eyka varsemi. Fyri tað fyrsta er tað ógreitt hvat liggur í hugtakinum 'kunnleiki', sum kann fevna um alt frá læknafakliga staðfestan kunnleika til illgruna, leysar metingar, ella upplýsingar sum ferðast í sosialum samanhangum. Tá hetta er ógreitt, kann vera ringt hjá einstaklingum at meta um, hvørt tey røkja sína lógarfestu skyldu, og kunnleikarnir, sum verða fráboðaðir, kunnu verða óvissar og óneyðuga nógvar í tali. Fyri tað næsta kann ein lógarbundin fráboðanarskylda skapa moralskan og sosialan ótryggleika í einari tíð, har samhaldsfesti er alneyðugt. Sosialir normar viðvíkjandi trúnað og álit kunnu vikna ella gerast ógreið, og fráboðanir kunnu standast av óvissu og ynski um at skáka sær undan ábreiðslum, ístaðin fyri av veruligum atliti til fólkaheilsuna. Einstaklingar kunnu kenna tvídrátt millum at røkja sína borgaraskyldu og at vísa relationelt trúfesti, og sosiala lívið kann kennast óstøðugt og vandamikið. Til endans kann eitt sosialt umhvørvi merkt av eftirliti máa undan opinleikanum fyri og álitinum á myndugleikarnar, tí einstaklingar kunnu verða minni sinnaðir at deila ivamál ella møgulig sjúkutekin. Ein lógarfest fráboðanarskylda kann tí í síðsta enda máa undan tí gjøgnumskygni og sporføri, sum skyldan skuldi stuðla. Av hesum orsøkum mælir Etiska ráðið til, at tað í lógini verður lagdur dentur á, at fráboðanarskyldan, í enn størri mun enn hinar heimildirnar, bara verður sett í gildi í undir serliga vandamiklum umstøðum og sum ein síðstur møguleiki.

*§ 10, stk 4: "Undir serligum umstøðum kunnu reglur um avmarkingar og forboð sambært hesum kapitli, vera galdandi fyri longri tíðarskeið"*

Tað er ikki greitt hví tað verður mett neyðugt at víkja frá markinum uppá 4 vikur, sum annars ásett í § 10, stk. 3: "Avmarkingar ella forboð og reglur um avmarkingar og forboð sambært hesum kapitli, kunnu

í mesta lagi vera galdandi í 4 vikur í senn." Uttan nærri grundgevingar tykist tað ivingasamt um ásetingin er etisk ráðilig. Tað er ógreitt hvørjar serligar umstøður talan kann vera um, tá umstøðurnar frammanundan eru serligar, og fráveran av einum evsta tíðarmarki ger samfelagið óneyðuga viðbrekið yvirfyri t.d. valdsmisnýtslu ella normalisering av undantaksheimildum. Etiska ráðið ásannar, at tað kann vera neyðugt at lata avmarkingar og forboð vera galdandi í longri enn 4 vikur. Tó gevur § 10, stk. 3, longu heimild til at leingja slík átøk, tó við í mesta lagi 4 vikum í senn áðrenn tey skulu endurskoðast, og tað tykist sostatt óneyðugt við einari eyka heimild uttan tíðarmark. Tvørturímóti metir Etiska ráðið tað vera skilagott, at allar avmarkingar javnan vera endurskoðar, soleiðis at tað áhaldandi kann metast um hvørt umstøðurnar legitimera frælsisskerjingarnar.

*§ 14: "Heilsustýrið kann, í samráð við Farsóttarnevndina, geva kommunustýri boð um at áseta avmarkingar fyri ella forboð ímóti, at avvarðandi og onnur fáa atgongd til røktarheim, eldrabústaðir, umlættingartilboð, eldrasambýli og líknandi tilboð, umframt til innandura og uttandura hentleikar í kommununi."*

Endamálið við ásetingini er at fyribyrgja, at vitjandi kunnu taka smittu við sær inn á ein stovn, og á tann hátt smitta búfólk og starvsfólk. Etiska ráðið ásannar, at eldri persónar ofta hava niðursetta immunverju, og at smitta fyri hesar persónar tí kann vera serliga vandamikil. Um endamálið einans er at verja hendan bólkin móti heilsuliga vandanum við smittusjúkum, eru avmarkingarnar í greinini skilagóð amboð. Sum kunnugt eru líðing og lívsgóðska tó ikki einans tengd at kropsligari heilsu, men eisini at eitt nú sálarligum og sosialum viðurskiftum.

Undir koronafarsóttini vóru átøk sett í verk, sum avmarkaðu vitjan á eitt nú røktar- og ellisheimum. Atfinningar vóru tá viðhvørt at hoyra, sum vístu á tungu sálarligu byrðarnar hjá teimum, sum sótu avbyrgd í síðstu tíðini av lívinum, og spurt var um slíkt einsemi var ein ov stórur prísur at gjalda fyri smittuverjuna. Av hesari orsøk gav Etiska ráðið í 2020 út fráboðan við hesari niðurstøðu:

"Etiska ráðið heldur tó, at tá talan er um tey gomlu á røktarheimunum, áttu myndugleikarnir at verið farnir fram við størri varsemi. Teir áttu at sett sær spurningin, um ikki serligar fyriskipanir kundu verið settar í verk nógv fyrr, sum tryggjaðu teimum gomlu betri møguleikar at fáa vitjan og at vera saman við øðrum. Havast má í huga, at røktarheimini eru heim teirra, sum búgva har, og at mong teirra hava ikki langa tíð eftir at liva í. Etiska ráðið heldur, at myndugleikarnir í hesum máli hava verið ov paternalistiskir og í ovurumsorgan hava sett til viks autonomiina hjá teimum gomlu. Atlit til sjúkrahús- og heilsuverk, røktarstarvsfólk og onnur hava helst vigað tyngri enn atlitið til sjálvavgerðarrættin og lívsvirðini hjá teimum gomlu, og tað hevur gingið nógv út yvir teirra lívsgóðsku hesa tíðina. Etiska ráðið heldur, at her er talan um eitt øki, sum krevur serligt varsemi og serlig atlit frá samfelagnum. Tí verður heitt á avvarðandi myndugleikar, Heilsumálaráðið, Almannamálaráðið og Kommunufelagið, um at hyggja nærri eftir, hvussu hendan avbjóðing verður loyst á ein betri hátt, skuldi smittustøða við koronu ella aðrari ókendari, illa smittandi umfarssótt aftur tikið seg upp."[1]

[1] Sí alla fráboðanina her: https://etiskaradid.fo/koronutiltoekini-og-tey-gomlu-a-roektarheimunum/

Etiska ráðið fegnast um, at tað í viðmerkingunum til § 14 stendur, at um “búfólk liggja fyri deyðanum, eigur atlit í mest møguligan mun at verða tikið til hetta, soleiðis at avvarðandi kunnu vera um búfólkið síðstu tíðina. Í hesum førum eigur stovnurin at miða ímóti at finna eina hóskandi loysn saman við búfólkinum og teimum avvarðandi. Stovnurin má tó altíð hava sjúklingatrygdina hjá hinum búfólkunum og vandan fyri, at starvsfólk verða smittað, í huga, tá ið hetta verður gjørt.” Samstundis varnast ráðið , at viðmerkingarnar einamest tykjast at taka atlit til kropsligu heilsuna hjá búfólkum. At avmarka samveru við avvarðandi kann tó hava tyngri sálarligar og eksistentiellar avleiðingar fyri hendan fólkabólkin, sum hevur færri møguleikar at innheinta mista tíð enn aðrir bólkar. Tí mælir Etiska ráðið til, at atlit til sosiala og sálarliga heilsu í serligan mun verða tikin við í metingini av, hvørt stovnarnir nevndir í § 14 skulu steingjast fyri vitjan. Umframt at hendan skyldan kann skrivast inn í lógarviðmerkingarnar, eigur tað  eisini at verða tryggjað, at sálarfrøðiligur serkunnleiki er umboðaður í Heilsustýrinum, sum skal taka viðkomandi avgerðirnar, ella at avgerðirnar skulu takast í samráð við hendan serkunnleikan uttanfrá.

Umframt omanfyristandandi viðmerkingar, vil Etiska ráðið at enda viðmæla fimm smærri broytingar:

1. Tað er nevnt omanfyri, at sálarheilsa í  serligan mun eigur at hava ein leiklut í átøkum, sum miðja ímóti at verja eldri fólk á bústovnum móti smittusjúkum. Etiska ráðið vil harafturat gera vart við, at atlit til sálarheilsu sum heild eiga at verða tikin við í metingini av, hvørt inntrivandi átøk skulu setast í verk. Sum nú er tykist lógaruppskotið bert at taka atlit til kropsliga heilsu, meðan sálarheilsa als ikki verður nevnd. Tað hevði verið skynsamt, um tað gjørdist týðiligt at sálarheilsa eisini er ein týðandi partur av fólkaheilsuni, og at hetta verður tikið við í neyðugu metingunum.

2. Hóast tað stendur nevnt í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at lógin ikki heimilar tvingsil í samband við koppseting, er hetta ikki týðiligt í sjálvari lógini, sum hinvegin kann heimila tvingsil í samband við viðgerð. Etiska ráðið mælir tí til, at tað gerst týðiligt at viðgerð ikki umfatar koppseting.

3. Tað er ikki heilt greitt hvør hevur evstu ábyrgdina av heimilaðu átøkunum. Eitt nú verða Heilsustýrið, farsóttarnevndin og fakpersónar nevndir, uttan at tað er greitt um nakar av teimum hevur evstu ábyrgdina í teimum ymisku støðunum. Hetta eigur at vera týðiligt.

4. Valda orðingin í § 1 er ivaleyst eitt mistak: “Henda lóg hevur til endamáls (...) at virka fyri at slíkar sjúkur berast til Føroya”. Orðingin  eigur at verða rættað til “at virka ímóti” ella “at virka fyri, at slíkar sjúkur ikki berast til Føroya”.

5. Viðvíkjandi § 4: “Einstaklingar hava skyldu til (...) at gera alt fyri ikki at verða smittað ella smitta onnur.” Orðingin “at gera alt” er bæði løgfrøðiliga og etiskt óheppin. Skilt bókstaviliga gevur hon óavmarkaðar heimildir til privat verndarátøk, og hon ávísir eina absolutta skyldu, sum ikki tekur atlit til hvat er rímiligt ella møguligt at krevja av borgarum. Ein skynsamari orðing kundi verið “Einstaklingar hava skyldu til, eftir besta førimuni, at fylgja boðum og leiðbeiningum frá myndugleikum, til tess at verja seg sjálvi og onnur móti smittu.”

Etiska ráðið takkar enn einaferð fyri møguleikan at viðmerkja hetta týðandi lógaruppskotið.